



# Marius

Summi gjørdust kanska eitt sindur bilsin, tá tey sóu, at bólkurin sum vann føroyska partin av GBOB í fjør, aftur í ár hevur valt at melda seg til kappingina. Marius vann sannførandi í fjør, og stóð seg eisini sera væl í finaluni í fjør. Bólkurin endaði sum nummar 6 í heiminum.

Men hví hava teir í Marius valt at tekna seg til GBOB aftur í ár? –Tað er heilt einfalt tí, at tað er ein ov stórur kjansur at lata fara framvið. Í Føroyum er ikki so ofta, at tú hevur møguleika at luttaka í eini so stórari kapping, og tískil mugu vit royna at troyta teir møguleikar sum eru til staðar, sigur oddamaðurin Hans Marius Ziska.

Sum sagt, vann Marius føroyska partin av GBOB í fjør, og tískil mugu teir metast sum stórfavorittar at vinna aftur í ár. Men Hans Marius vil ikki taka nakað fyri givið. –Tað kann henda so ótrúliga nógv uppá eitt ár, og tí fara vit ikki at taka fyri givið, at vit vinna aftur í ár. Vit hava eisini meldað okkum til GBOB fyri at hækkað um støðið á kappingini.

Hóast GBOB er ein spennandi kapping við lokkandi vinningum, leggur ein merki til, at nógvir av okkara bestu bólkum ikki hava meldað seg til kappingina. Gestir, Markrel, Side Effect, Lama Sea, The Story Ends eru bara nakrir bólkar sum av einhvørjari orsøk ikki hava meldað seg til kappingina. Hví man tað vera so? –Eg gjørdist nokkso kløkkur tá eg sá, at so nógvir av teimum "størru" bólkunum ikki hava melda seg til kappingina. Eg haldi at einfalda orsøkin er, at tað eru so nógv fólk uttanlands, og at tað ikki liggur fyri hjá nógvum bólkum. Hetta er sjálvandi sera óheppið, sigur Hans Marius at enda.

**Teir sum mannað Marius eru:**

**Hans Marius Ziska:** ........................Gittar og sang
**Heðin Ziska Davidsen:**..................Gittar og kór
**Knút Háberg Eysturstein:**.............Tangentar
**Jens Pauli Joensen:**......................Trummur
**Niels Jákup í Jógvanstovu:** .........Bass

# Deja Vu

Ongin ivi er um, at Deja Vu er ein av favorittunum at vinna føroysku GBOB kappingina. Bólkurin er etableraður í føroyska tónleikalívinum, og verður av mongum mettur sum tað besta boðið uppá ein føroyskan tónleikabólk sum kann standa seg í útlandinum. Í Prix Føroyar finaluni í 2003 lyftist bólkurin frá at vera ein lovandi bólkur til at vera fólkaogn. Teir halda eitt sera høgt støðið í lagskrivingini, og bólkurin er næstan altíð vælspælandi.

Tónleikurin er ein sveimandi og droymandi streymur av tónum, ið dregur lurtaran inn í alheimin hjá bólkinum. Teir skapa eina vakra ljóðmynd. Tey nýggjastu løgini hjá bólkinum eru enn meiri lurtaravinarlig, og tískil er tað nógv sum talar fyri, at bólkurin hevur enn sterkari kort í hondini. Deja Vu luttóku eisini í GBOB í fjør, og vunnu seg tá í tjóðarfinaluna.

Bólkurin hevur tveir oddamenn, Líggjas og Flóvin, ið skiftast um leiklutin sum sangari. Teir hava ávikavist eina myrka og eina ljósa rødd, og tað riggar serliga væl, tá ið teir syngja saman. Hetta er enn ein styrkja við bólkinum.

Av tí at teir hava spælt saman í nógv ár, er samanspælið í topp. Teirra tónleikur krevur dugnaligar tónleikarar, og hesa uppgávu lyfta teir í bólkinum heilt væl.

Bassleikarin Rógvi Rasmussen hevur ikki spælt við bólkinum í eina tíð, av tí at hann er fluttur av landinum í lestrarørindum. Men á GBOB verður hann aftur á pallinum saman við Deja Vu.

**Teir sum mannað Deja Vu eru:**

**Líggjas Olsen:** ...............................Keyboard og sang
**Flóvin E. Viderø:**............................Gittar og sang
**Rógvi Rasmussen:**........................Bass
**Rúni W. Højgaard:** .........................Trummur

# India

Bólkurin India verður at hoyra á GBOB. Sambært sangaranum er talan um rokktónleik. Hann vísur á, at tað er torført at koma við nærri frágreiðing um tónleikaslagið, tí at tónleikurin inniheldur element frá nógvum sløgum av rokki.

Vit fáa íblástur av øllum frá 70ára rokki til dagsins New Rock, greiður Rói Johannesen frá í samrøðu við Sosialin. Hann sigur at bólkurin hevur eitt ár á bakið, og at limirnir miðvíst arbeiða við at betra programmið hjá bólkinum. Spurdur um hví India hevur meldað seg til GBOB kappingina, sigur hann: -Hví ikki? Nú er Prix Føroyar eisini avtikið, so vit mugu royna at vera har sum nakað hendir.

Hóast bólkurin ikki hevur meir enn eitt ár á bakið, so eru onkrar heilt royndar kreftir at finna í manningini. Bassleikarin Einar Jacobsen er ein kendur og virdur tónleikari í føroyskum høpi. Hann kenna vit fyrst og fremst sum sangara í gamla rokkbólkinum Wolfgang. Einar sang henda bólk til eitt heiðurligt annaðpláss í tí fyrsta Prix Føroyar tiltakinum nakrantíð. Eisini hevur Einar verið sangari í vælumtókta dansibólkinum Fluffy Toys.

Rói greiður frá, at limirnir í bólkinum ikki hava gjørt sær tær stóru vónirnar um at vinna kappingina, men tað er heldur ikki aðalmálið við luttøkuni hjá India. –Vit vilja bara sleppa at framføra okkara tónleik, sigur Rói stutt og greitt.

**Teir sum mannað India eru:**

**Rói Johannesen:** ...........................Sang og gittar
**Bárður Thomassen:**.......................Trummur
**Einar Jacobsen:**............................Bass og sang

# The Mount East (T.M.E.)

Rokkbólkurin T.M.E. er nærum eitt familjusamtak. Teir tríggir Sámal Petur, Torbjørn og Høgni Olsen eru brøður, og Páll Hansen er systkinabarn teirra. Hesir 4 og ein Tjørnuvíkingur mannað bólkin T.M.E.

Men hví ganga teir undir heitinum The Mount East? – Vit vóru einaferð ein kallatúr í haganum, og hildu at fjalli Fleisin, sum liggur omanfyri Hvalvík er eitt so vakurt fjall. Tað er hetta fjall, sum sipað verður til í navninum The Mount East, greiður Sámal frá.

Sámal greiður frá at bólkurin spælir rokktónleik, sum eisini inniheldur bleytar tónar. Teir gleða seg til at spæla til GBOB kappingina, tí at teir síggja kappingina sum eitt frálíkt høvið at vísa seg fram. – Sjálvandi vóna vit, at vit vinna og harvið sleppa ein túr til London. Men vit kunnu ikki gera annað enn at spæla okkara tónleik, og so er tað upp til onnur at meta um hetta røkkur allan vegin, sigur Sámal skilagott.

Bólkurin luttók eisini í GBOB kappingini í fjør, og fekk jalig ummælið í fjølmiðlum. Sámal sigur, at tónleikaslagið enn er tað sama, men ásannar eisini at limirnir eru blivnir eitt ár eldri, og eru harvið mentir sum tónleikarar.

**Teir sum mannað The Mount East eru:**

**Sámal Petur Olsen:**.......................Gittar
**Torbjørn Olsen:**.............................Gittar
**Høgni Olsen:** ................................Bass
**Páll Hansen:** .................................Sang
**Óla Jákup Thomassen:**.................Trummur